Tórshavn 6. mars í 2020

Til øll feløgini!

**Viðvíkjandi Corana - virusinum**

Vit hava eina stóra kapping um vikuskiftið í Kollafirði. Og næstu tíðina verða stórar kappingar og dystir.

FBF hevur havt samband við myndugleikarnar, tá ið tað viðvíkur Corona - virusinum. Víst verður í hesum sambandinum til heimasíðuna hjá landslæknanum, www.landslaeknin.fo

Tað eru komnar tvær plakat út, sum stutt siga almenninginum, hvat gerast skal. Ein til fyribyrging og hin til, tá ið man hevur illgruna um sjúku. Tær síggjast her niðanfyri til tykkara kunnleika og at heingja upp, um tit ynskja tað.

https://landslaeknin.stps.dk/~/media/50ACA28E47BB4333BC6B0E8B7AA942F8.ashx

https://landslaeknin.stps.dk/~/media/F9D8BCBC209C46248F89D3A5F8F4BDED.ashx

Tey ráðini, vit hava fingið í sambandi við dystir, venjingar osfr. eru hesi:

1) Øll, leikarar, foreldur og hjálparfólk vaska og spritta hendur áðrenn farið verður inn í høllina við komu, og eftirfylgjandi spritta hendurnar hvørja ferð, tá man fer inn í leikhøllina
2) Spritta dystarbóltar áðrenn hvønn dyst
3) Ikki taka í hondina á leikarunum á mótstøðuliðnum, tá ið takkað verður fyri dystin - *ganga framvið netinum sum vant, men ikki taka í hondina hvør á øðrum*
4) Hava spritt dispensarar tøkar
5) Eggja fólki til at hava hondspritt við heimanífrá
6) Um feløgini hava kiosk, vísa serligt varsemi og fyrivarni, spritta kannur, toastarar, pengakassa, knívar osfr. millum sølur.
7) Eggja fólki, sum hava sjúkueyðkenni til ikki at møta upp

FBF roynir at fáa til vega spritt dispensarar at brúka til størru kappingarnar, sum FBF skipar fyri saman við feløgunum, men heitt verður á feløgini sjálvi eisini at fáa hondspritt til vega, til leikarar tykkara at brúka og til at hava til heimadystir. Sum skilst er hetta ikki so lætt at fáa fatur í, so berið skjótt at.

Sundhedsstyrelsen hevur eisini gjørt eina síðu, sum vísir heilt nógv ymist viðv. Corona - virus:

https://www.sst.dk/da/Viden/Smitsomme-sygdomme/Smitsomme-sygdomme-A-AA/Coronavirus/Spoergsmaal-og-svar

Vinaliga

Flogbóltssamband Føroya